# Oljan fleyt yvir

**OLJUDÁLKING** **Ákæruvaldið vil hava Effo dømt fyri, at tað fleyt ivir, tá ið olja varð pumpað umborð á ein russiskan trolara í mars 2008. Skipið hevði skyldina, heldur Effo**

Randi Jacobsen

Nýggja kunngerðin um bunkring ásetir neyvt mannagongdir fyri, tá ið skip bunkra, og kunngerðin sigur eisini greitt, hvar ábyrgdin liggur. Nú er ikki loyvt longur at pumpa meira olju umborð, enn skipið hevur biðið um.

So greitt var alt ikki 10. mars 2008, tá ið russiska skipið Murmanski kom á Havnina fyri at bunkra.

Skipið bað um at fáa 58.400 litrar av olju, og gjøgnum umboðið hjá reiðarínum varð peningurin fluttur til Effo.

Slangurnar vórðu settar til, og 1000 litrar av olju fóru um minuttið umborð á skipið.

Tá ið tað nærkaðist, at skipið hevði fingið umbidnu nøgdina, veittraði maskinmeistarin av skipinum til Effo-mannin og bað hann halda fram við at pumpa.

Tað gjørdi hesin uttan at hava tryggja sær, at skipið hevði pening at keypa meira olju fyri.

### Lív kom í

Tá ið teljarin vísti góðar 124.000 litrar, sá maðurin, sum pumpaði olju umborð, at røringur kom í umborð á skipinum.

- Eg hoyrdi róp av brúnni, og fleiri menn fóru í sving. Tá skundaði eg mær at sløkkja, segði maðurin, tá ið málið var í rættinum týsdagin.

Hann viðgekk, at hann átti at havt spurt seg fyri á skrivstovuni, áðrenn hann helt fram við at pumpa olju umborð á skipið.

Hann sá ikki oljuna renna á sjógv, tí tað var á hinari síðuni á skipinum. Men hann sá, hvussu teir turkaðu olju upp umborð, og at olja var farin á sjógv.

Maðurin var nokkso nýggjur í hesum arbeiðinum, tí ið óhappið hendi, men hann segði seg hava fingið upplæring.

Effo-maðurin helt, at ábyrgdarmaðurin umborð hevði alla ábyrgdina, tí hann hevði biðið hann halda fram við at pumpa, og hann vísti, hvussu nógv olja aftrat rúmtist í tangunum á skipinum.

Oljan, sum skipið fekk ov nógv, varð pumpað í land aftur.

### Avtala ella ei?

Tað var annars nevnt á rættarfundinum, at tað vanliga er at steðga, tá ið umbidna oljan er pumpað umborð, men tað hendir tó meira enn so, at skip fáa meira olju, enn tey hava biðið um.

Ákærin helt ongan iva vera um, at oljufelagið hevði alla ábyrgdina. Avtalan var, at skipið skuldi hava ávísa nøgd, og fyri tað um maskinmeistarin veittraði, var tað ikki nøkur avtala.

Kravið hjá ákæranum var, at Effo fær 25.000 krónur í bót, og í hvussu er ikki minni enn 15.000 til 20.000 krónur í bót.

Sakførarin hjá Effo kravdi frídøming. Hann vísti á, at onrar reglur vóru tá, sum Effo kann hava brotið. Hann helt tað eisini vera løgið, at maskinmeistarin á russiska skipinum ikki var avhoyrdur av politinum eftir óhappið. Effo varð stevnt, bara tí Effo var her í Føroyum, helt hann.

Dómur fekkur í málinum í næstu viku.



## Hepni

Mett varð, at umleið 500 litrar av gassolju fóru á sjógv í hesum óhappinum.

Ein sløkkiliðsmaður greiddi í rættinm frá, at tað var so heppið við veðrinum tann dagin, at øll oljan savnaðsit í krókinum við oljukeiina, og oljan varð fingin upp við eingangsgyrðingum. Tí gekk væl at fáa oljuna upp og basa dálkingini.

Verri hevði verið, um oljan hevði rikið yvir móti bátabrúgvunum.


# Arkitektur og byggifrøðingur
til spennandi verkætlanir

Vit leita eftir einum byggifrøðingi og einum arkitekti til at styrkja um kjarnuførleikarnar á teknistovu okkara. Tørvur er á tveimum royndum fólkum, ið áður hava luttikið í byggiuppgávum frá a til ø.

Ert tú arkitektur, vænta vit, at tú ert skapandi av lyndi og nýhugsandi. Tú hevur holla vitan og ágrýtni at fáa eitt bygningsverk frá hugskoti til veruleika, samstundis sum tú skilir avbjóðingarnar av at leiða eina skapandi tilgongd. Tað er sjálvsagt, at tú brennur fyri byggilist og vilt berjast fyri teimum estetisku virðunum í nútíðar føroyskari bygging.

Ert tú byggifrøðingur, vænta vit, at tú ert nærlagdur og dugnaligur at finna tøkniligar loysnir, sum eru neyðugar, tá nýggir bygningar verða teknaðir. Kunnleiki til AutoCad Architecture og Revit er eitt krav. Tað er ein fyrimunur, um tú dugur at leggja til rættis eina prosjekteringartilgongd við prosjektleiðara amboðum.

Á teknistovuni leggja vit dent á virðiligt samstarv, har vit dyrka persónligar eginleikar og dygdir. Tað er umráðandi, at tú ert opin og fyrikomandi og hevur ein jaligan hugburð, ið styrkir um samanhaldið. Eftirútbúgving, persóns- og førleikamenning verða natúrligur partur av tínum arbeiðsumstøðum.

Tú hevur nú møguleikan at vera við til at mynda og menna eina nýmótans teknistovu, ið er í holt við spennandi verkætlanir.

**Hevur hetta tín áhuga, kanst tú senda eina umsókn við prógvum, lívsrensli (CV) og viðmælum innan hósdagin 21. oktober til:**

**Selmar Nielsen Arkitektur**
Landavegur 9 · FO-100 Tórshavn

*Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Um tú vilt vita meira um starvið, kanst tú ringja til Selmar Nielsen, stjóra, á 554812 ella Jóhan Syderbø, prosjektleiðara, á 554818.*

LANDAVEGUR 9 · FO-100 TÓRSHAVN · TEL. 35 48 12
FAX 35 48 10 · SNA@SNA.FO · WWW.SNA.FO

**Selmar Nielsen** Arkitektur Sp/f

Selmar Nielsen Arkitektur Sp/f er eitt arkitektavirkið í Havn, har 6 arkitektar- og byggifrøðingar starvast. Arkitektavirkið hevur síðstu árini staðið fyri stórum og nýskapandi arkitekta og projekteringsuppgávum í Føroyum, umframt at arkitektavirkið eisini hevur spennandi arbeiðsuppgávur fyri framman.





# TØKK

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara góða kona, mamma, omma og vermamma

**Malan Davidsen**
**Tórshavn**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Jákup Olsen og Poul Færø fyri troyst og styrk ígjøgnum sjúkralegu.
Tøkk til tykkum, ið vóru um hana á Landssjúkrahúsinum og Sjúklingahotellinum Hotel Tórshavn.
Tøkk til Ebenezer og tykkum, ið hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og aðrar heilsanir.

**Familjunnar vegna**
***Åge Davidsen***


# Bert 17 sleppa inn samstundis

Listabólkurin *FØRKA* hevur sítt fyrsta tiltak í Sjónleikarhúsinum í Havn mikukvøldið. Hetta er ein installatión við málningum, upplestri av yrkingum og annað.

Av tí at hetta ikki er eitt heilt vanligt tiltak, men stimbrar sansir á fólki á ein heldur øðrvísi hátt, hava tey, sum skipa fyri, valt einans at sleppa 17 gestum inn í senn, so øll kunnu fáa eina so góða uppliving sum gjørligt.

Tiltakið verður kvørt kvøld í døgunum frá 10. til 31. oktober frá kl. 19.37.

*FØRKA* er nýstovnaður listabólkur, sum hevur í hyggju at skipa fyri øðrvísi, nýskapandi tiltøkum, har bert hugflogið setur mørk. Í bólkinum eru: Anna Sofía Egilstrøð, Jytte Joensen, Ellindur Egilstrøð og Jónvá Danielsen